

Siv Jensen, fíggjarmálaráðharri Noregs, leggur um eina løtu fram uppskot til fíggjarlóg fyri 2015.

# Noreg: Fyrireika seg til oljuleiting á kendari toskaleið

**Jógvan Hugo Gardar**

08.10.2014 - 08:39

Oljan.fo

Nú klokkan 9 føroyska tíð leggur norski fíggjarmálaráðharrin, Siv jensen, fram uppskotið til fíggjarlóg fyri 2015. Nógvar gitingar hava verið um hvat sum stendur í uppskotinum, men hesaferð eru óvanliga fáir lekar komnir frá stjórnini.

Tó eru onkrir dropar komnir. Millum annað veit NRK at soiga at einar 40 milliónir verða settar av til oljuverndí Vesterålen og Lofoten. Hetta kann vera eitt tekin um at stjórnin fyrireikar oljuleiting í økinum.

Í nógv ár hevur politiska skipanin saman við oljuídnaðinum havt eitt orðaskifti um leitast skal eftir olju uttanfyri hesar báðar oyggjabólkarnar í Norður-Noregi. Lofoten er kent fyri

at vera ástarplássið hjá toskinum, og Lofotfiske er eitt fyribrigdi sum selur Noreg sum sjógætis- og ferðaamannaland.

Stjórnin hevur bundið seg til í samstarvsavtaliuni við stuðulsflokkarnar at eingin leiting skal fara í gongd so leingi hetta Stórtingið situr, tað vil siga til 2017. Men 40 milliónir til oljuvernd kann vera eitt stig á leiðini, har stjórnin vil fara í gongd við leitingina tá høvi býðst.

Tað sum annars verður tosa nógv um, er hvussu nógv sum stjórnin ætlar at brúka av uppspardu oljupengunum til at fíggja íløgurnar í 2015. Tí samstundis sum stjórnin hevur lovað at nógv skal gerast av tí almenna, so lovar stjórnin eisini skattalættar.